# UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 7. juni 2017
Mál nr.: 17/00355
Málsviðgjørt: ABD

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum** (Førleikakrøv til kokkar við fiskiskipum)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 105 frá 5. august 2015 um sjóvinnubrøv og førleikakrøv til manning við skipum verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 41 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:

"*Stk. 3.* Fyri at fáa sjóvinnubræv sum skipskokkur við fiskiskipum í heimasigling krevst, at umsøkjarin er fyltur 18 ár, og hevur staðið skeið sambært § 1 í kunngerð nr. 87 frá 18. juni 2013 um førleikakrøv til sjófólk, sum handfara matvørur umborð á skipi. Skipskokkur við sjóvinnubrævi sambært 1. pkt. kann við loyvi frá Sjóvinnustýrinum mynstra við skipi, ið vanliga er í heimasigling, tá skipið í einstøkum førum fer til fiskiskap uttanfyri føroyskt sjóøki."

Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen